# Sakna samskipan millum skúlar

MUSIKKSKÚLIN
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Musikkskúlalærarar úti á bygd eru ofta illa fyri hvat viðvíkur arbeiðsumstøðum – men hetta kann bøtast við hjálp av betri samskipan og samstarvi við millum annað Fólkaskúlan.

Tann føroyska Musikkskúla skipanin er góð, men nú hon fyllir 20 ár eru nakrar dagføringar kortini neyðugar, dagføringar sum ikki minst snúgva seg um samstarvið millum Musikkskúlan og aðrar skúlar og eina miðvísa og heildarliga hugsan á hesum øki.

Hetta tykist ganga aftur sum ein reyður tráður tá vit tosa við musikklærarar aftan á ráðstevnuna í Norðurlandahúsinum 22. og 23. oktober um evnið.

Ein av hesum musikklærarum er Atli Petersen, sum í nøkur ár hevur búð og undirvíst í Vestmanna. Hann fegnaðist um ráðstevnuna og menningina í Musikkskúlanum, men samstundis duldi hann ikki fyri sínari hugsan at nógv er at tríva í, um vit vilja betra skipanina.

»Tað kom sterkt fram á ráðstevnuni at summi ting hjá okkum eru rættiliga framkomin,« segði Atli Petersen, og vísti til tær tónleika framførslur sum settu dám á millum fyrilestrar undir ráðstevnuni. »Eg haldi fólk vóru ovfarin av tí professionella stignum og tí stóru enthusiasmuni millum okkara ungu næmingar. Tað vísti at vit hava eina skipan sum virkar, hóast alt. Hinvegin er heldur eingin ivi um at ein dagføring er neyðug; tað haldi tey flestu eisini vóru samd um.«



*Atli Petersen telist millum teirra ið eftirlýsa eitt meira skipað samstarv millum Musikkskúlan og aðrar stovnar, ikki minst Fólkaskúlan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Skúlarætt í fleiri ættir

Tað sum Atli Petersen og fleiri við honum eftirlýsa er eitt meira skipað samstarv millum Musikkskúlan og aðrar stovnar, ikki minst Fólkaskúlan. Veruleikin í tílíkum samstarvi hevur í áravís mint musikklærarar á at teir hava eina sárbara støðu í samanhanginum, við arbeiðsumstøðum sum eru munandi verri enn tær hjá vanligum lærarum.

»Vit sum arbeiða aðrastaðni enn í Havn og eru blivin meir ella minni fast inventar í Fólkaskúlanum, nógv av okkum kenna næstan at vit ikki eiga nøkur rættindi,« segði Atli Petersen, og vísti á kombinatiónsstørv sum ein veg at bøta um hetta. Samstundis eftirlýsti hann eina betri samskipan við lokalar skúlaleiðslur fyri arbeiðið hjá musikklærarum, serliga teimum sum starvast úti á bygd.

»Kombinatiónsstørv høvdu kunnað gjørt tað lættari; her ganga jú einir 10-15 lærarar og mala í skúlatíðini og taka næmingar úr aðrari undirvísing… Vit liva upp á vælvild hjá stjóranum á staðnum, og hendan hevur tíbetur verið til staðar. Men trupulleikin er framvegis har: tú hevur ein bólk av musikklærarum sum ikki hava nakran sjálvskrivaðan rætt og sum mugu standa skúlarætt fyri bæði lokalum leiðslum og sínari egnu leiðslu… Vit hava fleirdupultar kommandolinjur at dragast við, og tað kann vera rættiliga strævið í gerandisdegnum.«

»Ráðstevnan var avgjørt eitt postivt tiltak upp á allar mátar, og eg hugsi hon gjørdi sítt til at hjálpa okkum musikklærarum at definera okkum sum bólk, sum Martin Mouritsen jú vísti á… Vit fingu jú eisini nógv innlit í hvussu tingini fungera í grannalondum. Eg skilti eisini á lagnum at okkurt nýtt er í umbúna hjá okkum júst hvat viðvíkur kombinatiónum í starvssetanum, soleiðis at millumrokningar kunnu ganga via Mentamálaráðið. Tað er sjálvandi gleðiligt at nakað hendir á hesum øki; tí her er sum sagt nógv at tríva í… «

»Tað er eisini ein spurningur um hvussu markið millum sang og tónleik skal setast í praksis, tí sangur hevði kanska í nógvum førum kunnað sorterað undir Fólkaskúlanum, og kundi verðið fíggjaður tann vegin; og vit áttu at kunnað keypt og selt tænastur millum stovnar, eins og norðmenn gera.«

»Á nógvum plássum er tað ein trupulleiki verulig leiðsla manglar, og tílíkt er ógvuliga torført at fyrihalda seg til starvsliga. Eitt annað, sum ikki kom á stevnuni og sum kanska heldur ikki hoyrdi heima har, er hetta at musikklærarar í Føroyum verða fluttir runt í heilum… Hetta er sera frustrerandi tá tú roynir at byggja nakað upp, tað tekur jú tíð; og tá tú livir teg inn í arbeiðið so vilt tú ikki sleppa tínum næmingum upp á fjall heldur, men tað er júst tað sum hendir…«

# Skúlin sum mentanarlig arena



*Tormod Bjørnstad, leiðari fyri áhugafelagið Musik i Skolen: Musikkskúlin eigur at virka sum ein ressursu miðdepil*

*Mynd: Jens K. Vang*

SKÚLI OG MENT
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Fólkaskúlin má taka sína ábyrgd í at fáa í lag eitt gott samstarv við Musikkskúlan, og fyri at skapa eitt mentarligt forum má samstarv og samskipan til millum nógvar partar. Tað segði norðmaðurin Tormod Bjørnstad, leiðari fyri áhugafelagið Musik i Skolen, undir musikkskúla ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið.

Undir fyrilestrinum »Skolen som kulturarena« meinti Bjørnstad millum annað at Fólkaskúlans leiðslur mugu taka ábyrgdina fyri einum heildarligum mentanararbeiði í sínum umráði.

»Skúlin má hava ein persón við ábyrgd fyri tí mentanarliga,« segði Bjørnstad, »og eitt mentanarligt forum eigur at verða skipað, soleiðis at Musikkskúlin gerst ein resursu miðdepil, samstundis sum skúli og frítíð verða betur samskipað.«

»Teir partar ið mugu samstarva um eitt ment-anarligt forum, eru Fólkaskúlin við einum serligum mentanar samskipara í starvi, kommunan, Musikkskúlin, áhugafeløg og ymiskir felagsskapir, vinnulívið, og einstaklingar herundir sjálvboðin foreldur; síðani skal eisini eitt stýri vera fyri tað mentanarliga forumið.«

»Alt hetta tekur tíð at byggja upp, men vinningurin er stórur: ein heilt onnur motivatión millum næmingar, ein hægri status og størri álvari fyri tónleikin sum yrki, eitt betri samstarv og ein betri stemningur millum foreldur og skúlar, og ein ørgrynna av synergi effektum, fyrst og fremst mentanarliga, men eisini samfelagsliga og búskaparliga.«



# Mugu trífalda talið á musikklærarum

RÁÐSTEVNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Vilja vit eins og íslendingar satsa uppá at fáa tónleikin til ein vinnuveg, so mugu vit trífalda talið á musikklærarum í Føroyum; musikkskúli í hvørjari kommunu kann skjótt gerast eitt lógarfest krav.

Føroyskir musikk- og sanglærarar funnu í felag eitt sterkt stev í Norðurlandahúsinum um vikuskiftið, har ein stór ráðstevna um musikkskúla undirvísing og harat tengt viðurskifti gav ljóð fyri týðandi tættum. Við útvaldum gestum úr norrønum grannalondum var frá byrjan dúkað til íblástur og frískligt orðaskifti um alt millum nýggjar møguleikar, neyðugar dagføringar og hugsandi ábøtur fyri ta nú 20 ára gomlu traditión ið nevnist Føroya Musikkskúli.



*Heiðrunn S. Petersen og Jákup Lützen imponeraðu saman við øðrum næmingum úr Tórshavnar Musikkskúla*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Aftan á eitt imponerandi innslag fríggjamorgunin av einum stykki úr Eine Kleine Nachtmusik eftir Mozart, frá ungum Musikkskúla næmingum, setti landsstýrismaðurin í mentamálum ta tveir dagar longu ráðstevnuna.

»Hatta var flott,« mátti Jógvan á Lakjuni ásanna, so skjótt hann kom til mikrofonina. Restin av tí hann segði var í stuttum, fyriuttan at bjóða vælkomin, at Musikkskúlin hevur stóran týdning fyri Føroyar, at hann hevur vunnið virðing og vælvild millum politikarar og fólk yvirhøvur, og at stór framgongd hevur verið innan tónleik í Føroyum, ikki minst Musikkskúlanum fyri at takka. Hann vísti somuleiðis á at ein endurskoðan av lógini um Musikkskúlan er í gongd, samstundis sum hann bendi á at undirvísing í tónleiki framyvir væl kann hugsast at gerast lógarfestur partur í útboðnum av kommunalum tænastum.

»Musikkskúlin í Føroyum hevur havt sera stóran týdning,« førdi Jógvan á Lakjuni fram, »og eg tori at siga at hann, serliga tey seinnu árini, hevur upplivað stóra vælvild frá politiskari síðu og eina breiða undirtøku millum fólk. (...) Kortini verður Musikkskúla lógin í løtuni endurskoðað, og ein arbeiðsbólkur er settur ið skal koma við uppskoti til nýggja lóg (...) Mær vitandi gongur tað tann vegin í okkara grannalondum, lógarliga sæð, at tað verður obligatoriskt fyri kommunur at reka musikkskúla.«

## ‘Kombinatiónsstørv’

Á ráðstevnuni settu norsk, føroysk, donsk og íslendsk innsløg fokus á spurningar um bæði faklig og bygnaðarlig viðurskifti í sambandi við musikk- og sangskúla í nøkrum økjum sum, hóast ólík í mongum, kunnu kennast aftur í nógvum felags umstøðum. Alt bendir á at fyrireikarar so væl sum luttakarar yvirhøvur kundu fegnast um eina væleydnaða ráðstevnu, ið fekk fram tað nógva av tí ið fyrireikararnir vildu hava fram í ljósið.

Talan var um fyrilestrahaldarar ið verða roknaðir sum lyklapersónar í sínum respektivu londum, og tí varð eisini væntað at nógv áhugavert fór at verða tikið upp á tal, bæði undir sjálvum fyrilestrunum og undir teimum atknýttu kjakfundunum.

Norðmaðurin Erik M. Bugge, ið er dagligur leiðari fyri Kultursamarbeidet i Vesterålen, talaði nógv út frá tí bygnaðarliga, bæði hvat viðvíkur skúla og samfelag. Hann vísti á tónleik sum part í einari mentanarpolitiskari heild, samstundis sum hann vísti á týdningin í at byggja brýr, bókstaviliga millum oyggjar so væl sum í meira yvirførdum týdningi millum stovnar, millum fólk og so framvegis. Vesterålen er ein región í Norður Noregi sum ikki sørt minnir um Føroyar, bæði í náttúru og fólkatali.

»Brúgvabygging snýr seg um at heildin gerst meir enn summurin av pørtunum,« segði Bugge og peikaði á nøkur viðurskifti í norskum distriktum. »Sterk traditión fyri samspæli og samstarvi millum amatørar og professionell; (...) menning av skipanum fyri kombinatiónsstørv; samstarv við región og land um skúlakonsertir; søla av tænastum til musikklívið (...).«

Júst hetta við kombinatiónsstørvum var nakað sum skuldi vísa seg at fanga áhugan hjá mongum av áhoyrarunum. Í stuttum snýr tað seg um at seta, sum liður í norskum bygdamenningar politikki, fólk í størv sum bæði musikkskúlalærarar og útinnandi tónleikarar, til dømis hálva tíð í hvørjum av hesum størvum.

»Hesi størv kunnu vera skipað á ymiskan hátt,« segði Bugge. »Tað kann til dømis vera ein sum er 100 prosent í starvi hjá mentanarskúla, og tá kann arbeiðssetningurin vera 100 prosent undirvísing ella umsiting/undirvísing; talan kann eisini vera um starv sum økistónleikari ið merkir hálva tíð undirvísing og hálva tíð útinnandi tónleikur; eisini kann ein partur av arbeiðstíðini seljast via mentanarskúla til frálæru í frítíðar musikklívinum. Síðani kann talan vera um starvsbýti; hetta kann vera millum mentanarskúlan og musikklinjuna í miðnámsskúla; millum mentanarskúla og fólkaskúla; ella millum mentanarskúla og arbeiði sum organistur. Síðani finnast eisini nógvir dugnaligir amatør tónleikarar sum undirvísa nakrar fáar tímar um vikuna.«

»Millum fyritreytirnar fyri menning av einum musikk- og mentanarlívi í distriktunum kunnu nevnast: høgur yrkisligur førleiki; menningar entreprenørar; kombinatiónir og samspæl; mentanarpolitisk heildarhugsan.«

Meðan Erik M. Bugge kanska setti tónan fyri ráðstevnuna, so vóru hinir fyrilestrarnir ikki minni relevantir og áhugaverdir sambært sang- og musikklærarar ið høvdu leitað sær í Norðurlandahúsið. Tiltakið skuldi vísa at fyri-reikararnir, Føroya Musikklærarafelag og Føroya Sanglærarafelag, høvdu nógv upp á hjarta og vildu veruliga fáa í lag eitt orðaskifti.



*Erik M. Bugge vísti á fyrimunir við kombinatiónsstørvum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Petur O. Petersen helt fyrilestur um sangin í føroyska fólkaskúlanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Íslendingar satsa

Formaðurin í Føroya Musikklærarafelag, Sunleif Rasmussen, var ikki í iva tá vit aftan á tiltakið spurdu hann hvat hann helt. »Ráðstevnan eydnaðist serstakliga væl,« segði hann. »Vit fingu lýst tað vit ætlaðu: viðurskifti fyri musikkskúla í økjum sum líkjast okkara… Ikki minst hetta við kombinatiónsstørvum gevur nakað at hugsa um, hetta er nakað ítøkiligt sum vit avgjørt høvdu kunnað fingið fyrimunir av at gjørt nakað við her í Føroyum. Hugsa tær eisini at musikklívið kann ríkast rættiliga nógv, um undirvísarar kunnu arbeiða sum útinnandi tónleikarar ein part av tíðini.«

»Tað er eingin ivi um, sum eisini kom týðiliga fram í innlegginum frá Tormod Bjørnstad, at samstarvið millum Musikkskúlan og aðrar skúlar kann betrast og mennast. Heldur enn at síggja upp á teir ymisku skúlarnar sum nakrar isoleraðar kassar ið einki skulu hava við hvønn annan at gera, so haldi eg tíðin nú komin til at vit hugsa eitt sindur meira um heildina, um samstarv og samskipan millum stovnarnar… Eg haldi Musikkskúlin eigur at standa meira sjónligur í miðdeplinum hvat undirvísing í tónleiki viðvíkur, og eigur at samstarva meira miðvíst við Fólkaskúlan, miðnámsskúlarnar og Læraraskúlan.«

»Sanglærarafelagið, sum jú er partur av Føroya Lærarafelag, var við í fyrireikingini av hesari ráðstevnu, og tað var ikki uttan orsøk. Teirra fyrilestrarhaldari úr Noreg hevði nakrar sera áhugaverdar visiónir um framtíðarinnar skúla og frítíðar virksemi… Her er samstarv lykilin, samstarv millum lærarar, musikkskúlar, ítróttarfeløg, foreldur… At virka í leiklutinum sum taxaforeldur er kanska vorðið ov nógv av tí góða fyri mong. Men alt hetta er sjálvandi ikki óproblematiskt, tað má koma frá meira enn einum parti… Her eru faklig mørk og ymiskar fyritreytir og nógv praktisk viðurskifti; musikklærarar hava jú ikki somu pedagogisku fyritreytir sum vanligir fólkaskúlalærarar. Men samstarvið millum skúlaleiðarar og musikklærarar má eisini skipast betur.«

»Tað kom eisini væl fram at íslendingar eru nógv fremri enn vit tá tað snýr seg um tónleikin í skúlanum. Høvdu vit tikið hetta í sama álvara sum teir og veruliga satsa uppá at gjørt tónleikin til ein vinnuveg, so hevði tað kravt at vit høvdu 100 musikklærarar ístaðin fyri sum nú er 32. Tað er jú so at jú smærri vit eru, jú betri mugu vit vera fyri at kunna at gera okkum galdandi… Hetta hava íslendingar innsæð; teir leggja nú ein gróðrarbotn so teirra ‘undirskógur’ verður betraður, soleiðis at lunnar kunnu leggjast undir eina tónleikavinnu.«

»Bara at hava talent hjálpir ikki nógv; tað skal hart arbeiði til, um nakað veruligt skal spyrjast burturúr. Samanum tikið hevur gingið framá við okkara Musikkskúla síðani byrjan fyri 20 árum síðani; men skal hugsingur vera um at gera vinnuveg burtur úr tónleikinum, so mugu vit satsa nógv meira upp á frálæruna.«